AGANEVNDIN

KÆRA 5/2011

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Undrið FF kærir B68 fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 14.05.2011 | Aganevndin móttikið kæru: 3. juni 2011 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristjansen, ráðgevi og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

Undrið FF hevur í skrivi, móttikið hjá FSF 16. mai 2011, kært B68 fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum Undrið FF og B68 tann 14. mai 2011 í 2. deild menn.

Í kæruni vísir Undrið FF á, "*at B68 hevur nýtt leikaran Bjarki Johannesen í dystinum hóast hesin leikari ikki stendur skrásettur sum leikari hjá B68 í Leikaraskráserting FSF's*"

B68 er hoyrt í málinum og ger í skrivi, dagfest 23. mai 2011 vart við, at "*leikarin Bjarki Johannesen er uppvaksin í Tofta Ítróttarfelag og bert hevur leikt við B68 líka frá smápiltum og at tað er óskilligt, at hann ikki er skrásettur sum leikari hjá felagnum*".

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 14. mai 2011 varð dystur leiktur millum Undrið FF og B68 í 2. deild menn. Leikarin Bjarki Johannesen leikti sambært dómaraseðlinum fyri B68.

FSF skrivstovan upplýsir fyri Aganevndini, at leikarin ongantíð er skrásettur sum leikari hjá B68.

**4. Lógarverkið**

Sambært grein 15, stk. 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's, ella tá loyvisbræv er útskrivað.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at regluverkið er greitt innan hetta øki, sbrt. grein 15, stk 3 í Kappingarreglum fyri Fótbólt er leikari lógligur leikari, tá hann er skrásettur í leikaraskráseting FSF's ella tá loyvisbræv er útskrivað. Aganevndin staðfestir, at leikarin Bjarki Johannesen ikki var skrásettur í leikararskrá FSF's

AGANEVNDIN

| 6. Niðurstøða |
|---|
| Leikarin Bjarki Johannesen leikti ólógliga í dystinum tann 14. mai 2011 millum Undrið FF og B68, sbrt. grein 15, stk. 3.<br><br>Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.<br>Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum. |
| **7. Úrskurður** |
| Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og tað skipan, sum er gjørd fyri brúka av spælarum.<br><br>Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður B68 2 deild menn dømt at tapa dystin móti Undrið FF tann 14. mai 2011 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt. |
| **8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.** |
| Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum. |
| **9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**<br><br>**Tórshavn 08/06 - 2011**<br><br>Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna |